# Lundakvøld á Viðareiði

**Leygarkvøldið 5. apríl skipar Hotel Norð á Viðareiði fyri einum sokallaðum lundakvøldi og dansi**

HUGNAKVØLD
*Solby A. Eliasen*

Leygarkvøldið 5. apríl verður hugnakvøld á Hotel Norð á Viðareiði. Til matna verður fiskatallerkur við øllum góðum úr sjónum, steikt lundabringa a la Hotel Norð og dessert og kaffi omaná.

Undir borðhaldinum verður skemt, sum Óli Olsen og Mogens Højsted fara at standa fyri, umframt felagssang sum Heini Ziska Dahl fer at skipa fyri.

Aftaná borhaldið verður dansur við Science Fiction.

Eins og til øll tiltøk á hotellinum verður bussur til og frá Viðareiði.

Hetta tiltakið er bert eitt av fleiri ymiskum føstum tættum, sum hotellið plagar at skipa fyri í vetrarhálvuni. Hotellið er stongt um veturin, men verður tó leigað út til ymiskt, tá tey ikki skipa fyri nøkrum sjálvi.

Vanliga letur hotellið uppaftur um Norðoyastevnuna við einum hugnakvøldi fríggjakvøldi á Norðoyastevnu. Og sum skilst verður tað helst eisini aftur á skránni í ár. Tiltøkini á Hotel Norð plaga at verða vælmóttikin, og nógv fólk plagar at vera. Til ber eisini at gista á hotellinum til hetta lundakvøldi. Tað er eitt serligt tilboð galdandi tað vikuskiftið. Áhugaði kunnu tekna seg til á telefon 451244 ella 217020 í seinasta lagi fríggjakvøldið 4. apríl



Tann 5. apríl verður eitt lundkvøld við dansi á Hotel Norð á Viðareiði


**KT-deildin søkir**

**1 KT-fólk**

Arbeiðsuppgávan er, saman við og undir leiðslu av KT-leiðaranum, at luttaka í dagliga rakstrinum innan flest øll øki av KT-umhvørvi felagsins. KT-umhvørvið umfatar Windows ambætarar og arbeiðspláss, IBM iSeries (AS/400) ambætarar, og harafturat ymiskan net-útbúnað. Stýriskipanirnar eru Windows 2000, Windows XP, Windows NT, Windows 98 og IBM OS/400. Onnur forrit v.m. eru m.a. MS Office, MS Exchange, Navision, DB2/400, Transfer, bókingarskipanir til skips- og flogferðir.

***Arbeiðsuppgávur:***

- Tilrættislegging og rakstur av trygdar-avriting
- Umsiting av brúkarum
- Umsiting av teldupostskipan
- Partvís umsiting av dátusavninum
- Eftirlit við skipanini sum heild
- Tilrættislegging av rakstri
- Aðrar rakstraruppgávur
- Gera ymsar útskriftir
- Forrita, um førleikin er til tað
- og aðrar viðkomandi uppgávur

***Persónligir eginleikar:***

- Góð samstarvsevni
- Hava góðan hug at ogna sær nýggjan førleika
- Fryntlig/ur

***Førleiki:***

- Útbúgving og/ella drúgvar royndir innan KT
- Royndir við Windows NT ella 2000 neyðugar
- Royndir við S36, AS400, Unix ella mainframe er ein fyrimunur
- Royndir við forriting er ein fyrimunur
- Kunnleiki til TCP/IP er neyðugur
- Kunnleiki til SQL-dátusøvn er ein fyrimunur
- Kunnleiki til routarar og firewall er ein fyrimunur

***Arbeiðstíð:***
Eftir avtalu. Viðhvørt er neyðugt at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

***Løn:***
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber, men vit bíða fegin eitt sindur eftir tí rætta fólkinum.

Umsókn við CV, prógvum og skjalprógvum annars mugu vera KT-deildini í hendi í seinasta lagi 28. mars 2003. Umsóknir eftir hendan dag kunnu tó verða viðgjørdar, um serligar umstøður tala fyri tí. Meira kann fáast at vita við at venda sær til Sámal Olsen, KT-leiðara, á tel 345939 ella 214328 ella við telduposti til kt@smyril-line.fo.

J. Bronckgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link



FERÐAFRAMSÝNING




**Myndir , tekningar v.m. frá tiltakinum verða at síggja í Føroya Banka**

Føroya Banki hevur stuðlað tiltakinum UNG Í FØROYUM 2003, og sum liður í hesum verður skipað fyri eini ferðandi framsýning í deildum bankans.

Framsýningarnar verða frá týsdegi kl. 9.30 til og við hósdag kl. 18.00 á hesum støðum:

| | |
|---|---|
| Saltangará | 25.-27. mars |
| Tvøroyri | 1.-3. apríl |

kontoIN




# Bankaviðurskifti á netinum

**Elektron og føroysku peningastovnarnir bjóða nú eina skipan á Internetinum, har kundarnir kunnu greiða sína viðurskifti ókeypis – allastaðni frá**

PENINGASTOVNAR
*Heri á Rógvi*



*Í framtíðini kunnu øll bankaviðurskifti hjá privata kundanum greiðast á netinum. Elektron hevur ment eina skipan til føroysku peningastovnarnar, sum marknaðarføra seg hvør í sínum lagi.*
Mynd: Jens Kristian Vang.

Føroysku peningastovnarnir eru nú klárir við einari nýggjari útgávu av teirra home banking. Higartil hava vit sæð tænastu sum Heimagreiðslan og HeimaBankin. Og munurin er heldur ikki tann heilt nógvi á hesum og teimum nýggjastu tænastunum.

Munurin er stórt sæð tann, at nú gongur alt fyri seg á netinum, og neyðugt er ikki at leggja nøkur nýggj forrit inn á teldurnar.

**Stór nýtsla**

Elektron hevur staðið fyri at gera skipanina til føroysku peningastovnarnar. Elektron hevur nýtt ymsar undirveitarar til at menna skipanina.

Hvør peningastovnur hevur sína egnu útgávu av somu skipan. Hjá Føroya Banka eitur skipanin Netbankin, hjá Føroya Sparikassa Heimagreiðslan, hjá Norðoyarsparikassa Spar2 og Suðuroyar Sparikassi hevur valt at kalla sína útgávu somuleiðis fyri Heimagreiðsluna.

Munurin á skipanum er at kalla eingin – einans í útsjónd og ávísum møguleikum.

Til at nýta Netbankan ella Heimagreiðslu krevst Internet Explorer 5,0 ella nýggjari, og teldan skal hava eina stýrisskipan frá Windows 98 ella nýggjari íroknað Windows NT og Windows XP.

Sostatt mugu Mac brúkarar framvegis hyggja yvirum hegnið.

Møguleikarnir við nýggju Internet útgávuni av bankanum og greiðslunum eru at kanna saldo, fáa yvirlit yvir bókingar, flyta pening umframt at samskifta við kundaráðgeva um tryggan teldupost. Somuleiðis ber til at senda lániumsóknir beinleiðis á netinum.

Í mun til verandi skipanir gevur henda skipanin nakrar møguleikar afturat, men eitt nú er ikki møguligt at flyta lønir, og sostatt hóskar henda skipanin seg best til privat persónar og smærri fyritøkur, ið ikki hava tørv á teimum nógvu lønarflytingunum.

Skipanin er ætlað at verða nýtt á einari ella fleiri "heimateldum" av trygdaráðum. Við einari sokallaði café skipan ber til at nýta skipanina, uttan mun til hvar tú ert. Við hesari skipanini fært tú eitt eingangs loynital sendandi sum SMS boð.

Niels Christian Nolsøe, stjóri fyri Elektron, sigur, at tendensurin aðrastaðni hevur víst, at fólk skjótt venja seg við at greiða sína ørindi á henda hátt, og nýtslan veksur skjótt.

Hetta sami fer at gera seg galdandi í Føroyum, meta bæði Niels Christian Nolsøe og Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa.

**100% trygd**

Fyri at greiða tey formellu viðurskiftuni og fáa skipanina at rigga á telduni, so skal ein sáttmála gerast við peningastovnan. Sáttmálin skal fyrst undirskrivast, og so skal kundin koma aftur í peningastovnin við tali. Hóast hetta er eitt sindur roksut, so tykist skipanin at rigga væl.

Niels Christian Nolsøe heldur ikki, at tað er neyðugt hjá fólki at ivast í trygdini.

– Vit nýta bert tað allarnýggjastu tøknina, ið stóri peningastovnar úti í heimi eisini nýta. Hetta er tað besta á marknaðinum, og fólk kunnu kenna seg heilt trygg, sigur Niels Christian Nolsøe.

Skipanin er ókeypis at fáa sær, og kostar heldur einki árliga. Gjaldast skal fyri flytingar uttanlands, men gjaldið er ymiskt í teimum ymsu peningastovnunum.

Verandi Heimagreiðslur og Heimabankin verða framvegis virknar.

# Myndugleikar ósamdir um Vallalíð

**Oljumálaráðið heldur, at byggingin skal steðga, men borgarstjórin hevur eina áskoðan um bygginguna í Vallalíð**

BYGGING
*Heri á Rógvi*

Kanska mest umtalaða byggimál seinastu tíðina hevur verið bygging av heimi fyri dement í Vallalíð í Havn.

Grannarnir hava kært sína neyð, og býráðið hevur ásannað sítt mistak og hevur lækkað hæddina á heiminum. Men hetta er ikki nóg mikið.

Oljumálaráðið, ið umsitur byggimál, er komið til ta niðurstøðu, at byggingin eigur at halda uppat. Orsøkin er, at byggingin er í einum A-1 øki, sum Oljumálaráðið ikki metir kunna rúma einum tílíkum heimi.

Men Jan Christiansen ger greitt, at hann ikki ætlar at fylgja harraboðunum. Hansara sjónarmið er, at byggjast kann væl eftir ásetingunum í A-1, og hetta ger Tórshavnar kommuna eisini fleiri onnur støð í høvuðsstaðnum.

Í skrivinum frá Oljumálaráðnum stendur at lesa, at heitt verður á kommununa um at steðga byggingina.

Í skrivinum stendur at lesa:

„At Tórshavnar kommuna í viðmerkingunum til kæruna sigur, at so at siga allir bygningar í kommununi, sum eru til eldrarøkt og barnaansing liggja í A1 økjum, metir Oljumálaráðið ikki hevur so stóran týdning, at greiðar ásetingar í byggisamtyktini kunnu setast til viks í hesum máli“

Oljumálaráðið fer so langt sum at siga, at Tórshavnar kommuna ger tulkingar eftir egnum tørvi, og hetta kann seta rættartrygdina í vanda hjá borgarunum.

– Vit ganga útfrá, at kommunan steðgar arbeiðinum. Verður hetta ikki gjørt, so fara vit at kanna, hvørjar møguleikar vit so hava, sigur Rókur Tummasarson, deildarleiðari í Oljumálaráðnum, sum hevur viðgjørt kæruna.

Hann sigur seg ikki kunna svara, hvørji stig, teir kunnu hugsast at taka, fylgir kommunan ikki áheitanini, sum kommunan altso ikki ger.


SKEIÐSTOVAN KVASIR FAROPANT

**Nýggjar TELDUKOYRIKORT-røðir á KVASIR**

Byrja í mai.
Kom á skeið eina ferð um vikuna.
Vel ímillum mánamorgun ella mikudag seinnapart í hugnaliga umhvørvinum á KVASIR.

Kostnaður 9.900,00
- uttan próvtøkur
- um tú teknar teg til allar sjey partarnar.

Nærri lýsing um ymisku partarnar (modulini) er á heimasíðu okkara www.kvasir.fo ella ring og fá meira at vita á tlf 320 204.

http://www.kvasir.fo TEL 320 204